# Tað var ein stór løta



Sunleif Ramsussen fekk týskvøldið handaða tónleikavirðisløn Norðurlandaráðsins. Hóast nógvar royndir, hevur tað tíverri ikki eydnast okkum at fáa nakra mynd av stóru løtuni, tá Sunleif Rasmussen fekk virðislønina handaða

**Tað var ein øgiliga stór løta at standa á pallinum og fáa heiðurslønina handaða, sigur Sunleif Rasmussen, tónaskald. Serliga heiðurin er hann sera glaður fyri**

HEIÐURSLØN
*Edvard Joensen*

Hann er glaður. Sunleif Rasmussen, tónaskald, sum týskvøldið fekk handaða Tónleikaheiðursløn Norðurlandaráðsins á samkomu í finska høvuðsstanum Helsinki.

– Tað er greitt, at tú kennir teg sum nakað heilt serligt eitt sovorðið kvøld, tí tað vóru hóast alt 12 vælrenomerað nøvn, sum innstillað vóru til virðislønina, sum eg fekk, sigur hann. Til dømis var dirigenturin, sum stjórnaði orkestrinum til hátíðarhaldið týskvøldið, eisini innstillaður.

Dagurin var nakað buldraligur, greiðir Sunleif Ramsussen frá i telefonini úr Helsinki. Har var tíðindafundur og samrøður meginpartin av degnum. Og um kvøldið var so stóra samkoman, har sjálv heiðurslønin skuldi handast.

Tað var »við manér«, sum sagt verður. Allir ríkis- og stjórnarleiðarar í Norðanlondum sótu í fremstu røð, og tað gjørdi løtuna enn meira spennandi.

Nógv vóru tey, sum vildu heilsa upp á Sunleif Rasmussen og ynskja honum tillukku eftir handanina, greiðir hann frá. Serliga vóru tað Margretha drotning og íslendski forsetin, Ólavur Ragnar Grímsson, sum høvdu hug at práta eitt sindur meira enn bara at siga góðan dag og tillukku, greiðir Sunleif frá.

Hann sigur, at tað hevur vakt ans, bæði í Norðurlondum, men so sanniliga eisini úti heimi, at hann hevur fingið norðurlendsku tónleikavirðislønina. Eisini vóru forsætisráðharrarnir millum teirra, sum ynsktu tillukku.

Teirra millum var tað tó bara svenski forsætisráðharrin, Gõran Persson, sum rættiliga hevði sett seg inn í, hvør maðurin, ið hevði fingið virðislønina, var.

– Vit fingu eitt rímilia langt prát, har hann avdúkaði, at hann visti, hvør eg var, sigur Sunleif Rasmussen.

Aftan á sjálvt hátíðarhaldið vóru eisini onnur, sum høvdu hug at heilsa upp á tónaskaldið. Millum annað brúkti hann nakað væl av tíð saman við teimum, sum áður hava fingið hesa virðirslønina, sigur Sunleif Rasmussen.

Tað fer víða um heim, tá ein fær eina slíka virðisløn sum hesa, Sunleif Rasmussen nú hevur fingið. Tað verður kunngjørt í tíðarritum, sum hava við evnið at gera, og tey verða eisini listin uttan fyri Norðurlond.

– Tað eru komnir fyrispurningar um tónleikin há mær úr londum sum Fraklandi, Italia og heilt úr Japan, greiðir Sunleif Rasmussen frá. So tað er greitt, at tað setir síni spor.

Men tað liggur nógv hart arbeiðið aftan fyri, áðrenn ein kemur so langt, sum Sunleif Ramsussen nú er komin. Og ikki ber til at liggja ov leingi á laurberunum heldur, vísir hann á.

Tað liggja fleiri bíleggingar niðurfyri, og hann hevur nokk at takast við eini trý ár fram, sigur hann.

Hann skrivar í løtuni tónleik, sum danir hava biðið um, og seinni skal hann skriva eina kamaropera, sum skal frumframførast í Norðurlandahúsinum í Havn á heysti 2005.

Eisini verður arbeitt við ætlanum um eitt størri verk, sum helst annaðhvørt skal latast einum finskum ella einum donskum orkestri. Talan verður helst um eina symfoni, sum so kemur at vera nummar tvey í røðini, sigur Sunleif Ramsussen.

– Men tað er ikki komið endaliga upp á pláss enn, sigur hann. Tað er forlagið hjá honum, sum arbeiðir við tí.



Og gingu kongar fram á rað.... Tey heilsaðu Sunleifi, og serliga Margretha drotning, longst tv., og Ólafur Ragnar Grímsson, forseti longst t.h. høvdu hug at práta

## Nýggjur stjóri á Strandfaraskipum Landsins

TÍÐINDASKRIV
*Vinnumálaráðið tann 30. okt 2002*

Landsstýrismaðurin í vinnumálum, Bjarni Djurholm, hevur tikið avgerð um at seta Kristian Davidsen sum stjóra fyri Strandfaraskipum Landsins frá 1. januar 2003 at rokna.

Kristian Davidsen er 36 ára gamal og er útbúgvin elektro sivilverkfrøðingur og hevur tikið HD í organisation.

Kristian Davidsen starvast sum leiðari á deild hjá Ericsson, sum veitir kunda tænastur í Norðanlondum og í Baltisku londunum.



# Móðir og døtur í lívsvanda

FERÐSLUVANLUKKA
*Vilmund Jacobsen*

Í tí nógvu og serstakliga hálu svartahálkuni týsmorgunin hendu nógv ferðsluóhapp ymsastaðni kring landið.

Eitt av teimum álvarsomu, sum lættliga kundi kostað mannalív, um eydnan ikki var við, var ein hending á landsvegnum í Saltnesi. Ein minni vørubilur við móðir og tveimum ávikavist 8 og 3 ára gomlum døtrum fór skeivur á vegnum, slerdi síðuna út ímóti lágu bilverjuni og fór upp um hana við hjólunum hægst. Bilurin endaði hálvur úti í sjónum - á takinum.

Einasti sjónarváttur til hendingina, var Jógvan Ósá, løgreglumaður, sum júst tá var á veg út á Toftir í samband við eitt annað ferðsluóhapp har úti.

Tíðliga í stóra "buginum" í Saltnesi, stutt uttanfyri Sandsøluna, møtir hann vørubilinum, sum kemur inneftir. Knappliga missir førarin á vørubilinum tamarhaldið, og Jógvan Ósá sær í speglinum, tá ið bilurin er farin fram við, at hann fer "siglandi" eftir vegnum, slær síðuna móti bilverjuni, bóltar tvørtur um verjuna við hjólunum hægst, kemur niðuraftur á hjólini hinumegin og bóltar enn einaferð, til hann at enda liggur á takinum, hálvur úti í sjónum.

Jógvan steðgar og skundar sær á staðið. Beinanvegin eru aðrir bilar komnir, og saman við Jógvani hjálpa onnur til at fáa tey trý, sum eru í vørubilinum, út í øllum góðum.

Tær tríggjar, móðir og døtur, fara fyrst á Politistøðina og síðan á Læknamiðstøðina til viðgerðar. Har vísir tað seg, at tey bert hava fingið smávegis likamligar snuddir.

Eingin ivi er um, at ein slík ferðsluvanlukka sum hendan, skjótt kundi kostað mannalív, um hepni ikki var við teimum, sum vóru í bilinum.

Bóltaði bilurin einaferð ferð aftrat, hevði hann farið undir, tí staðkendir menn, sum steðgaðu á í Saltnesi hendan morgunin, siga, at djúpt er út fyri.

Á Politistøðini í Runavík siga tey, at vørubilurin koyrdi hóvliga, tá ið óhappið hendi, men tað var bara so óvanliga hált hendan morgunin.

Jógvan Ósá hevur sagt, at tá ið hann møtti bilinum, var ferðin í øllum førum ikki omanfyri 50 km. um tíman.

Á hesum vegastrekki í Saltnesi er mest loyvda ferðin 80 km. um tíman.



Her kundi lættliga ein vanlukka verið hend í tí nógvu hálkuni týsmorgunin. Móðir og tvær ávikavist 8 og 3 ára gamlar døtur vóru í bilinum, sum bóltaði uppum lágu bilverjuna og endaði hálvur úti í sjónum - við hjólunum uppeftir.

Mynd: Vilmund Jacobsen





## Heystfundur Sambandsfloksins 2002

Árligi heystfundur Sambandsfloksins verður á Hotel Hafnia 2. november kl. 10.00 Høvuðsevni á fundinum verður "Vinnan", - herundir

1. Lýsing av føroysku vinnuni
2. Fremmandur kapitalur
3. Alternativir vinnumøguleikar
4. Privatiseringar

Eisini verður høvi at taka onnur evni fram á fundinum

Øll sambandsfólk eru vælkomin

Sambandsflokkurin